VIÐMERKINGAR

Landssjúkrahúsið og barnagarður

Jónfinn Olsen
form. í UfM

(Av tí at onkur villa var í hesi grein herfyri, prenta vit hana umaftur, vit biða greinskrivaran umbera mistakið)

Gleðiligt at hoyra, at landsstýrismaðurin í almanna- & heilsumálum nú tekur barnagarðin á Landssjúkrahúsinum í álvara. Hetta hendir dagin eftir, at pallborðsfundurin hevði verið í Norðurlandahúsinum, har Miðflokkurin tók hetta mál fram og vísti tað seg, at blíva eitt av høvuðsevnunum á fundinum í seinna hálvleiki. Hetta var júst tað, vit vildu hava, at fólk sóu álvaran í, at barnagarðurin á Landssjúkrahúsinum fer at loysa stóran part av barnaansingartrupulleikunum í høvuðsstaðarøkinum, hann fer eisini at gera tað attraktivari hjá læknum og sjúkrasystrum at koma hendavegin og søkja starv á Landssjúkrahúsinum.

Verður barnagarðurin á Landssjúkrahúsinum veruleiki (sum Miðflokkurin vil arbeiða fyri) fer hetta at lætta trýstið á hinar ansingarstovnarnar, av tí at tey, ið arbeiða á Landssjúkrahúsinum vilja væntandi flyta børn síni á henda barnagarðin, onnur sum so standa á bíðilista sleppa sostatt inn á hinar stovnarnar. Leypa pláss av á barnagarðinum á Landssjúkrahúsinum, hevur verið frammi at børn, ið standa á bíðilista, kunnu fáa møguleika at koma inn á hesi plássini. Hetta saman við ætlandi 20.000.000,00 íløguni fram til 2003 hjá býráðnum skuldu barnaansingartrupulleikin í Havn verið loystur.

Miðflokkurin vil vísa á, at Eirargarður skal fáa frið hesum viðvíkjandi og brúkast til tað, Eirargarðurin verður brúktur til í dag. Barnagarðurin skal hava nýggj høli og ikki nakra fyribils loysn.

Til viðmerkingarnar hjá ávísum politikara í bløðunum herfyri, er bert at siga: »halt teg til at arbeiða landspolitiskt so leingi tú ert løgtingsmaður, tí sannlíkt er, at ein trupulleiki er viðvíkjandi Landssjúkrahúsinum, og tað er at ongir barnaansingarmøguleikar eru til børnini hjá teimum, ið arbeiða har og trupulleikin er eisini stórur at fáa fólk at koma henda vegin at arbeiða av somu orsøk. Eitt sum eisini kann nevnast er, at nýggj útbúgving fyri kommunulæknar skuldi setast í verk, har møguleiki skuldi verða hjá tveimum at taka hesa útbúgving í Føroyum, men bert ein skal byrja, tí fleiri spurdu seg fyri, men millum annað var tað væntandi barnaansing, ið gjørdi, at fólk settust aftur at koma henda vegin«.

Jú, hetta má sigast at vera ein landstrupulleiki, men er eisini ein trupulleiki fyri Havnar kommunu, av tí at Landssjúkrahúsið er í Havn. Hava borgarar ikki eisini ein rætt, sum búgva í Havn, eins og aðrar borgarar hava ein rætt kring alt landið. Latið okkum standa saman og loysa henda samfelagstrupulleika í felag, so barnafamiljurnar ikki liða av tvørrandi vilja frá politikarunum.

Latið okkum ikki verða so ábyrgdarleys at verristilla heilsu og sjúkrarøkt her á landi, tí man ikki vil raðfesta/prioritera børnini og familjur teirra. Vælsignaðir veiti hesa íløgu til barnagarðin á Landssjúkrahúsinum sum skjótast.

Miðflokkurin vil arbeiða fyri at tryggja familjuni saman við børnum teirra tær bestu umstøður og góðar uppalingarmøguleikar kring alt landið.

Einskiljing við skili

Birgir Nónsgjógv

Teir gomlu kenningarnir í føroyska vinnulívinum eru nú, aftaná kyrrindini frá fríu burturlutingini av fiskirættindum, aftur farnir at gera um seg. Herrópið hesaferð er "einskiljing".

Síðani lagnuárini fyrst í 90'-unum, hevur bert gingið framá í landinum og nú, tað gongur so væl sum ongantíð fyrr, eru fleiri farnir at rópa varskó um, at vit mugu gera okkurt og soleiðis tryggja tann einstaka ímóti at alt einaferð afturat fer so loðandi á heysin. Trygging ímóti vanlukkum er góð, men tað er fáum í blóðið borið at spáa um framtíðina og tí er neyðugt at nýta hógv, áðrenn lopið verður á blóman eftir tryggingum ímóti bæði hesum og hasum, og ikki minst ímóti tí sum ongantíð hendir ella tí sum hendir kortini.

Ætlanin er nú at einskilja eina rúgvu av almennum ognum og soleiðis taka váðan frá tí einstaka. Hetta vil við øðrum oðrum siga, at fyri at minka um vandan fyri at fara á heysin, er loysnin at sleppa sær av við alt sum tú eigur.

Jú, gamani, men hetta er ikki nakað nýtt. Munnu ikki fleiri kenna orðataki: "Hann ið einki váðar hann einki vinnur".

Føroya Fiskavirking sum hevur staðið sum ein skansi í føroyskum vinnulívi og sum er hornasteinurin í einum støðugum feskfiskamarknaði sum aftur gevur eina støðuga rávørutilgongd, er nú aftur fyri skotum. Fyritøkan skal einskiljast og í sama andadrátti verður ásannað at tað verður ikki gjørt í verðandi líki. Føroya Fiskavirking skal burtur og býtast sundur í fleiri feløg. Hetta gevur møguleika fyri at einstakir persónar kunnu keypa sær hvør sítt virkið í staðin fyri at allir mugu verða saman í sama felagi. Keyparar liggja eftir øllum at døma longu framvið og prísin fyri virkini kunnu allir skjótt semjast um. Tað er tíðiligt at slík tala er vegnað keypararnar og ikki vegnað seljaran sum er tann "tryggi" einstaklingurin.

Styrkin í Føroya Fiskavirking er júst tann at hon er so stór sum hon er. Ein slík fyritøka krevur at umstøðurnar eru hampuliga støðugar og fer altíð at hava sum mál at hava støðug marknaðarviðurskifti, sum smærri virki fáa ágóðan av. Verður Fiskavirking seld sum einstøk virki missir hvørt teirra ein ávísan part av hesari styrkini og tað er spell.

Peningurin sum eitt nú skal fáast fyri Fiskavirking skal koyrast í tann ætlaða búskapargrunnin, sum hevur til endamáls at gera okkara skiftandi búskap eitt sindur støðugari. At petta Fiskavirking sundur ger viðurskiftini óstøðugari og tá er spurningurin um vit ikki missa meira fyri minni.

Rákið uttan í heimi verður sagt at verða tann vegin, at alt verður meira og meira einskilt. Hetta sæst einamest í eysturevropa.

Í teimum eysturevropeisku londunum er avmarkað hvat londini eru før fyri at eiga og tað er eisini stórt trot á nóg væl útbúnum fólki.

Støðan hjá okkum er heilt ein onnur, og nú vit tosa um rák uttan úr heimi, kundi verið vert at nevnt at fyritøkurnar gerast alsamt størri og størri. Tað er ikki í tráð við ætlaðu søluna av Føroya Fiskavirking.

Í sambandi við tann nevnda váðan hjá tí einstaka, er vert at minna á hvussu mannagongdin var fyrst í 90'-unum. Samfelagið fór á húsagang og treytirnar sum blivu settar við fyri at sleppa burturúr hesum, var at Føroya Landsstýrið skrivaði undir eitt risalán sum bar uppfyri, ikki bara tí almennu skuldini, men so sanniliga eisini fyri tí risaskuld sum tað privata hevði átikið sær. Tann váðaleysi fekk lortaspannina omanyvir seg og tað var nóg væl at hann hóraði undan.

Síðani fyrst í 1998 hevur Føroya Fiskavirking havt góðan byr og úrslitið er vaksið ár undan ári. Felagið bleiv stovnað í 1993 og tey fyrstu árini hevði tað so nógvar og stórar trupulleikar at dragast við, at tað meira enn tað einu ferðina varð hótt við húsagangi. Skeivar leiðsluskipanir, ovurstórar kapitalútreiðslur umframt lágir marknaðarprísir gjørdu tað ómøguligt at fáa verðuliga gongd á raksturin. Aftaná ta stóru politisku mótstøðuna í 1997, tá ið felagið var um at fara av knóranum var ídni og trivnaðurin ímillum arbeiðsfólkið tað einasta sum felagið átti eftir. Framtaksgrunnurin avgjørdi tíbetur at seta 60 milliónir í felagið og hetta var stirilin sum skuldi til, fyri at fyritøkan kundi lyfta seg uppá tað støði sum hon er á ídag.

Virðið í felagnum hevur síðani tá fleirfalda seg og tað er eingin í Føroyum í dag, sum setur seg føran fyri at keypa fyritøkuna sum hon er (sí, frammanfyri).

Skuldsetingar verða ístaðin settar ímóti felagnum, um at orsøkin til at tað hevur gingið so væl, eru tær stóru avskrivingarnar sum felagið hevur havt. Jú, tað er rætt at nógvur peningur er settur í Føroya Fiskavirking, men tað er eingin sum vil siga hvaðani hetta felagið er sprottið og hví eitt so stórt felag hevði so stóra skuld, so stutt aftaná at tað var stovnað.

Aftaná tað stóra skrædlið í 1992 stóðu ein rúgva av flakavirkjum kring landið og gapaðu av tí risaskuld sum hevði hópa seg upp ígjognum 80'-ini. Hetta vóru privat (les einskild) virki sum einstaklingurin onga ávirkan hevði á.

Fyri at fáa gongd á aftur mátti onkur taka um endan og tað var sjálvandi tann einstaki, tí teir einskildu vóru farnir av rókini meira og minni fjaðursárir.

Føroya Fiskavirking bleiv stovnað og hon umfataði 19 virki við høvd og gørnum.

Fyri tað fyrsta vóru virkini niðurslitin og tann studningsborni raksturin sum virkini høvdu havt, hevði við sær at tær íløgur sum blivu gjørdar, ikki miðaðu fram ímóti tí stórsta samfelagsbúskaparliga yvirskotinum, men tí størsta studningsyvirskotinum. Útbúnaðurin líktist stórt sæð á øllum virkjum og øll kundu arbeiða allan fisk. Sostatt var einki virki serútgjørt til ávísar framleiðslur.

Hetta var ikki smávegis at fara í holt við. Fiskavirking byrjaði sostatt ikki á berum, men mitt í einum ruskdunga sum mátti ruddast burtur fyri at koma niður á bert.

Hetta kostaði nógv og tey fyrstu árini tóktist tað sum peningurin hvarv, so hvørt hann bleiv settur í felagið. Fyri ein stóran part vóru hetta syndir frá 80'-unum sum skuldu gjaldast aftur.

At siga, at tað góða úrslitið bert kemst av tí nógva peninginum sum er settur í felagið, er samstundis ein háðan ímóti teimum 600-700 fólkunum sum arbeiða har. Tað er teimum fyri at takka, at felagið er so væl fyri sum tað er.

Aðrar vælvirkandi fyritøkur í landinum hava eisini ment seg nógv tey síðstu árini og tað er at gleðast um. Men hesar fyritøkur verða ikki nevndar tá ið Fiskavirking er fyri atfinningum. Vit mugu ikki gloyma at Framtaksgrunnurin hevur sett pening í fleiri av hesum fyritøkum, og tær hava so sanniliga eisini avskrivað sína skuld niður í landskassan fyrst í 90'-unum. Munurin á teimum og Fiskavirking er tann, at hon er almenn, tvs. tann einstaki eigur hana, men hinum fyritøkunum eigur hann einki í.

Myndin sum verður gjørd av Føroya Fiskavirking, er við hesum í geyma, alt ov einføld sum verður sett fram í hesum døgum. Felagið er ein vælvirkandi fyritøka í dag, og ein skal verða sera varin at pilka ov nógv við verðandi viðurskifti.

Um Fiskavirking skal seljast eigur hon at verða seld sum hon er og ikki sum einstøk virki. Undirritaði er sostatt ikki ímóti øllum einskiljingum, men sum áður nevnt, vert er at fara fram við størsta varsemi.a

Búskapur og vinna:

Fekk góða pensjón

Tað hevur vakt miklan ans í Svoríki, at fyrrverandi stjórin í stórfyritøkuni ABB, Percy Barnevik, fekk ein sáttmála við fyritøkuna um meiri enn 800 mió. krónur í pensjón, tá hann fór frá.

Fleiri nevndarlimir í ABB hava seinastu dagarnar sagt, at teir vistu einki um ta risastóru pensjónina, og teir leggja óbeinleiðis fyrrverandi stjóran undir at hava arbeitt í tí dulda. Men tað avsannar Percy Barnevik. Í samrøðu við svenskt sjónvarp leygardagin segði hann, at pensjónin varð avgreidd á tann hátt, sum eitt mál av tí slagnum eigur at verða avgreitt, og at allar tær neyðugu undirskrivtirnar vóru á skjølunum. Í samrøðuni við gekk Percy Barnevik, at upphæddin er stór, men sjálvur helt hann ikki, at pensjónin var heilt burturvið.

Tíðindini um ta góðu pensjónina hjá fyrrverandi stjóranum bórust seinasta mikudag, og tað hevur ikki gjørt støðuna betur, at tey komu bara fáar dagar eftir, at ABB hevði boðað frá, at felagið hevði fleiri mia. krónur í halli í fjør. Spurdur, um hann ætlar sær at lata fyritøkuni ein part av pensjónini aftur, svaraði Barnevik, at tað hevur hann ongar ætlanir um.

Samstundis er komið fram, at ein annar stjóri í ABB fekk næstan 500 mió. krónur í pensjón, tá hann gavst.

Rakar tey veiku

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, vil vera við, at nýggja danska figgjarlógin fer at raka tey veikastu í samfelagnum harðari enn øll onnur.

Í einum tíðindabrævi sunnudagin skrivaði Nyrup, at tey, sum fara at kenna sviðan av sparingunum á almannaøkinum, verða fyrst og fremst tey heimleysu, rúsevnismisnýtararnir, tey sinnissjúku og tey gomlu, og hetta er beint ímóti tí, sum stjórnarflokkarnir lovaðu í valstríðnum, skrivaði fyrrverandi forsætisráðharrin. Hann vil vera við, at tørvurin er tvær mia. krónur størri enn tað, sum er játtað á figgjarlógini.

UTTAN ÚR HEIMI

Burturflytari fyri rættin í USA

Amerikansku myndugleikarnir umhugsa at krevja at fáa fatur á manninum, sum verður lagdur undir at hava skipað fyri, tá tíðindamaðurin Daniel Pearl varð burturfluttur í Pakistan

BURTURFLYTINGAR
Árni Joensen

Tann 38 ára gamli amerikanski tíðindamaðurin Daniel Pearl. Eingin veit, hvar hann er, ella um hann er á lívi

Mynd: Reuters

Myndugleikarnir í Pakistan vita framvegis ikki, hvat er vorðið av Daniel Pearl, sum varð burturfluttur í pakistanska býnum Karashi herfyri.

Pakistanska løgreglan tók í síðstu viku Sheik Omar Sead, tí løgreglan hevur illgruna um, at tað var hann, sum legði burturflytingina til rættis. Hann hevur verið til avhoyringar fleiri ferðir, men sambært løgregluni vil hann einki siga.

Amerikanska blaðið Newsweek skrivar, at myndugleikarnir í Pakistan og USA hava illgruna um, at Sheik Omar Saed hevur verið uppi í trimum øðrum burturflytingum. Eisini tær ferðirnar vóru tað amerikanskir ríkisborgarar, sum vórðu burturfluttir.

Sambært Newsweek kanna amerikansku myndgleikarnir nú, um tað ber til at fáa Sheik Omar Sead útflýggjaðan til USA, so hann kann koma fyri rættin har.

Hann hevur greitt pakistansku myndugleikunum frá, at Daniel Pearl er deyður, men pakistanska løgreglan ivast í, um hetta er so, og leitingin eftir tíðindamanninum heldur fram.

"Scandinavian Star" kanska kannast umaftur

Norska løgreglan hevur seinastu mánaðarnar kannað øll skjøl í sambandi við vanlukkuna við ferjuni "Scandinavian Star" fyri tólv árum síðani. Vanlukkan kravdi 159 mannalív.

SKIPSVANLUKKUR
Árni Joensen

Avvarandi hjá teimum, sum doyðu, tá eldur kom í "Scandinavian Star", mótmæltu í fjør, at eingin fekk ta revsirættarligu ábyrgdina av vanlukkuni, og tey heittu tí á norsku myndugleikarnar um at taka málið uppaftur. Síðani hevur eingin hoyrt um málið, men í gjár váttaði løgreglan í Oslo, at hon hevur arbeitt við málinum seinastu mánaðarnar eftir áheitan frá ríkisadvokatinum í Oslo. Arbeiðið verður væntandi liðugt um einar fjúrtan dagar.

Leiðslan hjá løgregluni í Oslo sigur, at tey hava kannað alt skjalatilfarið av nýggjum, eftir at avvarandi hjá teimum, sum doyðu við "Scandinavian Star", eru komin við nýggjum upplýsingum, sum hava samband við málið. Síðani skal ríkisadvokaturin gera av, um meiri skal gerast við málið.

Tor-Geir Myhrer, ríkisadvokatur váttaði í gjár, at málið um vanlukkuna verður kanska tikið uppaftur, so tað kann endaliga staðfestast, um nakar persónur skal ábyrgjast fyri tað, sum hendi.

Hasse Magusson, sum misti tvey synir í eldinum umborð á "Scandinavian Star", segði við eitt norskt blað í gjár, at tey avvarandi hava latið myndugleikunum ymsar upplýsingar, sum eftir teirra tykki eiga at bera í sær, at málið verður tikið uppaftur. Hvørki tey avvarandi ella løgreglan vilja siga, hvørjar upplýsingar talan er um.

Úr Norðurlondum:

Keypa borgarar

Norska kommunan Aremark í Østfold er komin í trupulleikar, tí so nógv fólk flyta úr kommununi. Tað hevur havt við sær, at meðalaldurin á fólkinum hækkar støðugt, men nú hevur kommunan gjørt av at gera nakað við málið.

Fyri at fáa fólk at flyta til Aremark hevur kommunustýrið gjørt av at bjóða tilflytarum 75.000 krónur úr kommunukassanum. Einasta treyt er, at fólk eru millum 18 og 35 ár, og at tey keypa sær hús ella íbúð í kommununi. Um tey hava arbeiði ella eru arbeiðsleys hevur ongan týdning.

Borgarstjórin í Aremark, Gunnar Helgesen, sigur, at tey hava sett hálva aðru millión krónur á figgjarlógina í ár til endamálið, og sjálvur ivast hann ikki í, at okkurt fer at koma burturúr. Í dag búgva 1450 fólk í Aremark, og borgarstjórin væntar, at tey verða 50 fleiri, tá árið í ár er at enda.

Tey ungu roykja ov illa

Meðan fleiri kanningar prógva, at alt fleiri of gleiri vaksnir danir gevast at roykja, vísir ein nýggj kanning, at talið á ungum roykjarum í Danmark veksur. Tað er heilsustovnurin hjá ST, WHO, sum hevur gjørt kanningina.

Í árunum frá 1993 til 1996 royktu 23 prosent av teimum ungu í Danmark, men árini frá 1997 til í fjør var parturin 32 prosent, sigur WHO. Hóast tað ikki er tann stóri uggin í tí, vísir kanningin, at tað er ikki bara í Danmark, at gongdin er so. Myndin er tann sama í Noregi, Eysturríki, Kekkia og Bulgaria.

Svoríki og Ísland vísa seg hinvegin at vera undangongulond, tá tað snýr seg um at halda teimum ungu burturi frá sigarettunum. Kanningin hjá WHO vísir, at 25 prosent av ungdómunum í Íslandi og Svoríki roykja, og soleiðis er eisini í Írlandi.